– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Ein frálík og livilig oasa í miðbýnum

**Í hesum andarholi í miðbýnum finnur tú hesi frálíku, sera snøggu, væl hildnu og liviligu húsini.**









## Fyrsta fatanin

Innast í hugnaligu blindu gøtuni finnur tú ein grønan blett og snøggu húsini umgyrd av garði og urtagarði. Alt er sera snotiligt og væl hildið. Tú kemur inn í ein hugnaligan og væl hildnan urtagarð, sum er vakur bæði summar og vetur. Urtagarðurin hóskar sera væl til umhvørvið og hevur dæmi av náttúruøki. Húsini eru væl plaserað á stykkið og venda rætt móti sólini.

## Ljós og luft – inni og úti

Útigólvið, inngongdirnar og stóru vindeyguni við skjótihurð út á stóra útigólvið (terassuna) geva gott samband millum úti og inni. Stovan er stór og ljós, og tú hevur gott samband við uttara umhvørvi. Vilt tú vera meira inni hjá tær sjálvum, fert tú inn í stóra og hugnaliga alrúmi, sum eisini hevur beinleiðis samband við útigólvið. Innan eru húsini sera væl skipað (innrættað). Tit missa ikki hvønn annan burtur, men tú kanst eisini fáa fri og vera fyri teg sjálvan. Luftskiftisskipan við hitaendurnýtslu er, so húsini eru frískligg og heislugóð uttan at nýta ov nógva orku.

## Stílur og snið

Haldgóða dygdin sæst aftur allastaðin í húsinum – bæði uttan og innan. Alt er gjørt úr besta tilfari og sumt er dagført fleiri ferðir, so alt er sum nýtt. Uttan er alt dámligt og hugfarsligt, og innan er alt ógvuliga lívgandi og liviligt, ljóst og lekkurt. Einki er at gera – tú kanst mest sum bara flyta inn.

## Uttanfyri og uttanum

Uttanum er garður / urtagarður við girðing og ribeshekki, grasi, runnum og mongum plantum, tún við harragarðsflísum og grót í beton á norðursíðu. Nakað av útsýni er oman í býin og út á fjørðin. Húsini standa í friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg at kalla mitt á býnum við fríøki til tvær síður. Allir hugsandi skúlar, stovnar og handlar eru beint við.

## Innan

Í miðhæddini er goymslurúm / hjallur, inngongd, gongd, hjúnarrúm, baðirúm, køkur / alrúm / borðsstova við útgongd til útigólv, stova við útgongd til útigólv, inngongd, gongd / bryggers, baðirúm, millumgongd og 3 kømur. Á ovasta lofti er stórt bjálvað goymslurúm. Í neðra er krúpikjallari til allar rørføringar og innleggingar.

## Fakta

**Adressa:** ..........Fugloyarvegur 10, Tórshavn
**Byggiár:** ...........1978
**Hæddir:**............1 (2)
**Gólvvídd:**..........172,5 (222,5) m²
**Grundøki:**.........586 m²
**Hjallur:** .............ja
**Prísuppskot:** ...kr. 2.700.000,00









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**